Uppritið almannakunngjørt

UPPRIT um samráðingar við donsku ríkisstjórnina um rættarstøðu Føroya

Víst verður til semju frá 10. juni 1998 millum Føroya Landsstýri øðrumegin og donsku ríkisstjórnina hinumegin, ið er samtykt av Føroya Løgtingi og danska fólkatinginum. Í semjuni verður m.a. ásett, at danska ríkisstjórnin er sinnað til, við støði í stevnumiðum landsstýrisins at skipa Føroyar sum fullveldisríki, at fara undir samráðingar um eina nýggja tvítjóðaskipan Føroya og Danmarkar millum, ið eisini fevnir um eina skiftisskipan landanna millum, heruppií eina búskaparliga skiftisskipan, sum hevur við sær ein sjálvberandi føroyskan búskap.

Somuleiðis verður víst til samtykt løgtingsins av uppskoti landsstýrisins hin 2. oktober 1998 um at fara undir samráðingar við donsku ríkisstjórnina um rættarstøðu Føroya.

Eisini verður víst til útgreiningar og kanningar savnaðar í Hvítubók, ið landsstýrið hevur framt í samsvar við løgtingssamtyktina.

Harumframt verður víst til aðalorðaskiftið á løgtingi, ið hevur verið samsvarandi áðurnevndu samtykt.

Havandi í huga omanfyri standandi, og støðu landsstýrisins í hesum máli, hevur landsstýrið avrátt at fara undir samráðingar við donsku ríkisstjórnina við tí máli at gera ein altjóðarættarligan sáttmála millum Føroyar øðrumegin og Kongsríkið Danmarkar hinumegin, ið ásetir rættarstøðu Føroya og samstarv landanna millum í sínámillum felagsskapi.

Landsstýrið hevur avgjørt, at sáttmálin verður at fevna um hesar meginreglur:

1. Rættarstøða Føroya verður ásett á ein slíkan hátt, at evsta vald í Føroyum, heruppií einkarrætturin at skipa tað, liggur hjá Føroya fólki, við útinnir hetta vald gjøgnum síni kosnu umboð samsvarandi eini stjórnarskipan, sum er givin av Føroya fólki. Í hesum liggur eisini altjóðarættarligt virkisføri hjá Føroyum. Tað fer at hava við sær, at Føroyar frá at hava verið undirskipaðar Danmark verða síðuskipaðar Danmark, so at full javnstøða verður í felagsskapi landanna millum. (Sí s. 4)

2. Til tess at tryggja framtíðar rættarstøðu Føroya, verður sáttmálin av tílíkum slag, at hann verður bindandi sáttmálarættur í altjóðarætti so at brot á sáttmálan skal verða at skilja sum brot á altjóðarætt. Sáttmálin verður tískil fráboðaður Sameindu tjóðum sum ein altjóðarættarligur sáttmáli samsvarandi grein 102 í stovningarsáttmála Sameindu tjóða og skrásettur á skrivstovu Sameindu tjóða, og kunngjørdur av henni. (Sí s. 4)

3. Føroyar og Danmark halda fram sum higartil í gjaldoyrasamstarvi. (Sí s. 7)

4. Ein skipan verður gjørd viðvíkjandi ognum ríkisins við viðvíka Føroyum.

5. Semja verður gjørd um eina búskaparliga skiftisskipan, sum tryggjar føroyskum myndugleikum umstøður at fremja neyðugar tillagingar av føroyska búskapinum, uttan at hesar fáa avleiðingar fyri støðið á vælferðarsamfelagnum ella á almennum tænastum í Føroyum annars, ella overva føroyska búskapin við t.d. øktum skattatrýsti ella almennari lántøku. Búskaparliga semjan verður í høvuðsheitum at fevna um heildarveitingina, aðrar ríkisveitingar og skuld landskassans til ríkiskassan. (Sí s. 10)

6. Fyrisitingarligt samstarv millum myndugleikarnar í londunum báðum verður tryggjað í sáttmálanum í tann mun tørvur er á tí. Serstakar ásetingar og skipanir verða gjørdar fyri:

g) Uttanríkismál. (Sí s. 13)

h) Dómstólar, ákæruvald, løggverju, varðhald og kriminalforsorg. (Sí s. 15)

i) Fíggjareftirlit og innskjótaratrygdarskipan. (Sí s. 17)

j) Heilsuøki. (Sí s. 18)

k) Almannaøki. (Sí s. 21)

l) Flogferðslu. (Sí s. 22)

m) Skipaeftirlit. (Sí s. 23)

14. Javnstøða í tjóðskapi verður ásett millum føroyingar og danir, so at rættindi og skyldur føroyinga og dana verða tryggjað í londunum báðum, sum tey hava verið higartil. Herskylda, starvssetanir í almennari fyrisiting, umframt valrættur og vælbæri við val verða tó undantikin. Rættindi, talan er um, eru m.o. rættindi til búsetufrælsi, verkafrælsi og almennar tænastur hvør hjá øðrum, heruppií útbúgvingar, útbúgvingarstuðul, heilsuveitingar og almannaveitingar — tó skulu hesi rættindi ikki vera meira víðgongd enn undir verandi skipan. Í høvuðsheitum miðar landsstýrið eftir at varðveita støðuna, sum hon er í dag. Her eigur tó at verða havt í huga, at nevndu rættindi eru longu í stóran mun tryggjað í norðurlendskum sáttmálum. (Sí s. 24)

15. Føroyar og Danmark halda fram sum higartil undir sama kongi. Sostatt verður kongur Danmarkar av sær sjálvum eisini kongur Føroya. (Sí s. 27)

16. Ein felagsnevnd verður ásett í sáttmálanum. Felagsnevndin fær um hendur at fylgja við um sáttmálin verður hildin og útintur til fulnar av sáttmálapørtunum og at gera av um hann skal broytast samsvarandi egnum ásettum mannagongdum.

17. Sáttmálin verður at fevna um ásetingar um sáttmálabroytingar og sáttmálauppsøgn. Ásett verður, at í tann mun annar sáttmálapartaurin ella báðirynskja at menna ella at byggja sáttmálan út á øðrum økjum enn teimum, ið eru nevnd omanfyri undir pkt. 6, kann hetta fremjast eftir samtykki frá báðum pørtum. Eisini verður ásett, at Føroyum verður tryggjaður rættur, at einvíst siga upp fyrisitingarligt samstarv, sum er ásett í sáttmálanum, antin lutvíst ella alt, sum tað er. Sáttmálin heldur tó fram at galda á øllum øðrum økjum. Harumframt verður ein áseting um sáttmálauppsøgn orðað soleiðis, at sáttmálin kann sigast upp eftir ávísari mannagongd.

Viðmerkingar til meginreglurnar 1 og 2

Rættarstøða Føroya

Galdandi skipan viðvíkjandi rættarstøðu Føroya

Tann ráðandi fatanin á stjórnarstigi í heimssamfelagnum er, at Føroyar rættarliga eru umfevndar av fullveldi Danmarkar, ella sagt á annan hátt, at Føroyar eru í danska ríkinum.

Henda støða Føroya hevur við sær, at Føroyar ikki hava millumtjóða sáttmálaføri, og samsvarandi hesum eru Føroyar í grundregluni útihýstar frá sjálvstøðugum limaskapi í millumtjóða felagsskapum. Hetta er orsakað av, at fullveldi Danmarkar fevnir um Føroyar. Tí er tað Danmark, ið vegna Føroyar ger sáttmálar við onnur ríki t.d. um markið millum Stórabretlands og Føroya eins og sáttmálar um fiskiveiði, handil og annað.

Sum støðan er, hevur danska grundlógin løggildi í Føroyum. Rættarstøða Føroya er harumframt ásett í heimastýrislógini í tann mun, hon víkir frá støðuni hjá landslutum í Danmørkini sjálvari.

Sostatt verða Føroyar roknaðar sum ein danskur ríkislutur við víðari sjálvstýrisheimildum enn vanligt er fyri kommunur og amt annars í ríkinum.

Ónøgdugt er her at lýsa, hvussu heimastýrisskipanin virkar, tí hetta er væl kent.

Hvítabók hjá landsstýrinum um sjálvstýrismálið staðfestir, at heimastýrisskipanin serstaklига hevur við sær fylgjandi *tríggjar høvuðstupulleikar*:

18. Føroysku sjálvstýrisheimildirnar eru givnar við fólkatingslóg — talan er um *delegatión* ella *umboð* frá ríkismyndugleikunum. Samsvarandi hesum kunnu ríkismyndugleikarnir í grundregluni *einvíst* taka aftur hesar heimildir ella broyta innihaldið í teimum uttan føroyskt samtykki. Eisini hevur heimildarveitingin við sær, at heimildarveitarin (ríkismyndugleikarnir) hevur *tulkingarrættin* í ivamálum um, hvussu langt heimildirnar røkka. Hetta hava vit fleiri dømi um.

19. Ivi er um, hvørt løgtingslógir eru á sama rættarstigi sum fólkatingslógir. Hetta er ein fylgja av, at Føroyska löggávuheimildin er givin við heimastýrislógini, ið er ein fólkatingslóg.

20. Føroyar hava bert avmarkaðar heimildir at virka í millumtjóða høpi, alt eftir heimildarveiting frá ríkismyndugleikunum.

Hesi viðurskifti eru trupul, tá ið føroyingar ynskja, at føroysk löggáva og føroyskar fyrisitingarligar avgerðir ikki skulu kunna verða settar til viks av löggávu ella fyrisitingarligum avgerðum í øðrum landi (her Danmark).

Aðrir trupulleikar, ið eiga at verða nevndir, eru hesir:

21. Verandi rættarstøða heimilar ikki eini sjálvstøðugari føroyskari rættarskipan við egnum hægstarætti. Tó kann tað hugsast, at semja kundi fingist við donsku ríkismyndugleikarnar um skipan av einum føroyskum dómstóli í *sermálum*. Ein føroysk rættarskipan undir *donskum* fullveldi vil kortini altíð vera undirgivin einum donskum hægstarætti. Tað merkir, at evsti dómstólur altíð vil vera eitt danskt ríkisvald, og at londini tí ikki kunnu vera javnsett.

22. Føroyskir myndugleikar hava undir heimastýriskipanini ikki havt evstu ábyrgd av føroyska samfelagnum, og harvið heldur ikki búskapinum sum so. Hetta hevur áður havt óhepnar avleiðingar fyri búskaparstýringina, heruppi í vantandi tilvitan um tær avmarkingar í búskaparligari trygd, sum tilknýti Føroya til Danmark gav føroyska samfelagnum. Hetta hevur víst seg sum vantandi vilji til at byggja upp egnar skipanir til tess at tryggja føroyingar ímóti búskaparligum skelki.

Hetta kemst av, at evstavaldið í øllum viðurskiftum liggur hjá donsku ríkismyndugleikunum.

Núggeneral skipan viðvíkjandi rættarstøðu Føroya

Landsstýrið vil gera eina semju við donsku stjórnina um ein sáttmála millum Føroyar og Danmark, sum skipar ein nýggjan samstarvskarm millum londini, har id tey eru javnsett, og har tey arbeiða tætt saman um nærri tilskilað øki samsvarandi sáttmálanum. Tann *grundleggjandi rættarliga javnstøðan* Danmarkar og Føroya millum verður við hesum sáttmála staðfest í altjóðarætti.

Ætlanin er at fáa eina skipan, ið tryggjar, at evsta valdið í Føroyum verður at liggja hjá Føroya fólki og verður útint gjøgnum tess fólkaræðiliga skipaðu stovnar. Sáttmálin skal geva føroyingum rætt til sjálvir at skipa sítt löggávuvald, útinnandi vald (stjórnarvald) og dómsvald sambært eini føroyskari stjórnarskipan (grundlóg).

Tað merkir m.a., at tey mál, sum í heimastýrislógini verða nevnd sermál og felagsmál øll koma undir føroyskt ræði. Sama verður galdandi fyri tey mál, ið ikki eru nevnd í heimastýrislógini.

Týðningarmestu felagsmálini (samb. heimastýrisskipanini), ið við hesi skipan koma undir føroyskt ræði eru:

- Heimarættur (ríkisborgararættur)
- Uttanríkismál, heruppií trygdarmál
- Dómsvald og rættargangsskipan, heruppií hægstarættur og ákæruvald
- Løgverja
- Útbúgvingarmál
- Heilsumál
- Almannamál
- Kirkjumál
- Gjaldoyramál
- Fíggjareftirlit, peningastovnalóggáva og onnur löggáva á fíggjarøkinum
- Øll samskifts-, samferðslu- og flutningsmál, heruppií loftferðslumál og sjóvinnumál
- Fongsulsverk, kriminalforsorg og borgaralig revsimál
- Útlendingamál
- Persóns-, familju- og arvarættarlóggáva, ognarrættarlóggáva o.a.
- Upphavsrættur og einkarrættur

Landsstýrið vil, at kongsfelagsskapur og gjaldoyrafelagsskapur verður við Danmark.

Rætturin hjá Føroyum at umboða seg sjálvar í millumtjóða viðurskiftum skal verða tryggjaður í sáttmálanum millum Føroyar og Danmark, ið verður galdandi sáttmálarættur (*Treaty Law*).

Landsstýrið metir tað vera ynskiligt, at komandi sáttmálin fyriskipar ávíst samstarv við Danmark í uttanríkismálum.

Í sáttmálanum verður harumframt ásett tætt og víðtøkt samstarv í einum felagsskapi landanna millum, har fremsta ímyndin er ein felags kongur.

Sáttmálin skal binda Danmark til at boða Sameindu tjóðum (ST) frá nýggju støðu Føroya sambært sáttmálanum. Sáttmálin verður skrásettur hjá ST og kunngjørdur sum galdandi altjóðarættur.

Viðmerkingar til meginreglu 3

Gjaldoyraviðurskifti

Galdandi skipan viðvíkjandi gjaldoyra

Gjaldoyraviðurskifti Føroya eru skipað við lóg 248 frá 1949. Eftir grein 2 í hesi lóg hoyra peningamál viðvíkjandi Føroyum undir danska forsætismálaráðið. Fyristøða av skipanini liggur sambært lógini hjá ríkisumboðsmanninum og einum umboði fyri landsstýrið.

Sambært lógini nýta føroyingar egnar pengaseðlar, men danskar myntir sum lógligt gjaldevni í Føroyum.

Kurslutfallið millum danskt og føroyskt gjaldoyra er 1 króna = 1 krone.

Skipanin kann lýsast sum ein strang *currency-board*-skipan, við tað at seðlaumfarið fult út er dekkað við áogn hjá føroyingum í donskum krónum, sum sambært lógini skulu setast sum innskot á serliga konto í danska tjóðbankanum.

Upprunin til lógina var tann skipan, sum sett varð á stovn undir seinna heimsbardaga, har føroyskir seðlar høvdu fastan kurs mótvegis enska pundinum og har føroyska seðlaumfarið fult út var tryggjað við sterlingognum í bretskum peningastovnum.

Føroyar fáa ikki *souvereign* - ella myntvinning - av seðlaumfarinum sum rentu av innskotinum í danska tjóðbankanum. Hinvegin fær landskassin part av tí parti av yvirskoti danska tjóðbankans, sum verður goldin danska ríkiskassanum. Parturin, sum fellur í landskassans lut, verður roknaður sum lutfallið millum seðlaumfarið í Føroyum og seðlaumfarið í øllum ríkinum við árslok.

Lóg 248 frá 1949 áleggur danska tjóðbankanum at framleiða føroyskar pengaseðlar við sama áljóðandi virði sum danskir pengaseðlar. Landsstýrið og danska forsætismálaráðið samráðast um útsjónd seðlanna.

Núggj skipan viðvíkjandi gjaldoyra

Núggi sáttmálin ásetir, at Føroyar verða verandi í gjaldoyrasamstarvi við Danmark.

Føroyskir myndugleikar binda seg í samstarvi við avvarðandi myndugleikar í Danmark at skipa lóggávu, ið fult út tryggjar mynt- og seðlaumfarið í Føroyum við innskotum í danska tjóðbankanum ella øðrum ikki-føroyskum fíggjarkrøvum ásett í donskum krónum. Um so er, at Danmark fer við í triðja stig av EMU-samstarvinum, verða dekkningsreglurnar broyttar frá donskum krónum til evruna.

Neyðugt verður eisini, at føroyskir myndugleikar binda seg til í fakligum samstarvi við avvarðandi myndugleikar í Danmark at skipa bankalóggávu og aðra lóggávu á fíggjarøkinum í samsvari við tilsvarandi reglurverk í Danmark í tann mun hetta verður mett neyðugt fyri at tryggja fastan *paritet* millum lógligt gjaldevni í Danmark og lógligt gjaldevni í Føroyum.

Rætturin til og ábyrgdin av at skipa gjaldoyraviðurskiftini sambært sáttmála millum Danmark og Føroyar verður at liggja hjá føroyskum myndugleikum.

Føroyar eru ein lítil og opin búskapur. Hetta talar fyri, at føroyskir myndugleikar ikki nýta møguleikan til at føra *diskretioneran pengapolitikk*, heruppií rættin til gjaldoyraniðurskriving og -uppskriving. Avgerandi spurningurin er her, hvussu tey, ið nýta føroyskt gjaldoyra - føroyingar eins væl og útlendingar - kunnu hava álit á, at føroyskir myndugleikar ikki fara at nýta slíkan löggávurætt.

Fyri at grundarlag skal vera fyri hollum áliti á tað gjaldoyra, sum nýtt verður í Føroyum, er í fyrsta lagi neyðugt við strongum dekkningsreglum fyri mynt- og seðlaumfarið í Føroyum. Hetta kann gerast við løgtingslóg, sum áleggur tí stovni, sum umsitur pengaumfarið, at hava í minsta lagi 100% sum dekkning av mynt- og seðlaumfarinum. Neyðugt er eisini at stuðla uppundir álitið á gjaldoyraskipanina við aðrari löggávu innan fíggjarskipanina, serliga bankalöggávuni.

Í sáttmálanum verður lagt uppfyri, at støða Danmarkar sum samráðingar- og sáttmálapartur í sambandi við gjaldoyramál er ivasom.

Danmark luttekur enn ikki í tríðja stigi av EMU-samstarvinum, og kann tí - eftir øllum at døma - enn gera semju við Føroyar um fastkurs-samstarv har Danmark tekur ávísar skyldur á seg.

Hendan rætt hevur Danmark í grundregluni ikki, um so er, at Danmark fer í við í evrusamstarvið. Í slíkari støðu verður frumskjal 8 í ESsáttmálanum tó virkin[1]. Í hesum frumskjali er ásett:

„Bestemmelserne i artikel 14 i protollen om statutten for Det Europæiske System af Centralbanker og Den Europæiske Centralbank berører ikke Danmarks Nationalbanks ret til at udføre sine nuværende opgaver vedrørende de dele af Kongeriget Danmark, der ikke udgør en del af Fællesskabet"

Um so er, at ES-myndugleikarnir tulka hetta frumskjal rúmliga, so kann hugsast, at tann semja, sum verður gjørd um gjaldoyrasamstarv í sáttmálanum millum Føroyar og Danmark kann rúmast í frumskjali 8.

Landsstýrið eigur tó at vera fyrireikað uppá, at danir í samráðingarstoðu fara at føra fram, at teir ikki kunnu átaka sær skyldur í sambandi við nýggja gjaldoyraskipan millum Føroyar og Danmark, um rættarliga tilknýtið millum Føroyar og Danmark verður væl leysari, enn tað er í dag.

Orðingarnar í sáttmálanum skulu tí gerast soleiðis, at tær ikki verða at rokna sum bindingar fyri Danmark[2] til at vera við til at røkja eina ávísa gjaldoyraskipan galdandi fyri Føroyar. Talan er hinvegin um bindingar á *føroyskar* myndugleikar, um at skipa gjaldoyralóggávuna á ávísan hátt.

Føroyskir myndugleikar skulu sostatt í hesum altjóðarættarliga sáttmála binda seg til at gera slíkt gjaldoyralóggávu, at teir ikki kunnu nýta upp- og niðurskriving av gjaldoyranum (t.e. *diskretioneran pengapolitikk*) sum amboð í búskaparpolitikkinum.

Um so er, at danir ikki fara undir tríðja stigi av EMU-samstarvinum, so vil føroyska gjaldoyra - eins og í dag - framhaldandi hava fastan kurs móti donsku krónuni.

Hinvegin: fer Danmark við í tríðja stigi av ØMU-samstarvinum, skal tað gjaldoyra, sum nýtt verður í Føroyum, fult út verður grundað á EURO við føstum *pariteti* mótvegis hesum gjaldoyra.

Orðingarnar um gjaldoyraviðurskiftini skulu eisini geva rúm fyri frá føroyskari síðu at taka undir við skipan, har evran beinleiðis gerst alment gjaldoyra í Føroyum, skuldi slíkt staðið føroyingum í boði.

Avmarkingar hjá Danmark til at gera semju við Føroyar um gjaldoyraskipan gera seg serliga galdandi í grein 111, stk. 3 í ES-sáttmálanum.

Tilvísingar til hesa grein ganga aftur í sáttmálum um *monetary relations*, sum t.d. Frakland, Italia og Portugal hava gjørt við lond við og uttan fullveldi (Monako, San Marino og Vatikanríkið, St. Pierre-et-Miquelon, Mayotte, Cape Verde, CFA-økið og Komoroyggjar).

Grein 111, stk. 3 í ES-sáttmálanum hevur hesar orðingar:

„Såfremt Fællesskabet skal forhandle aftaler om monetære spørgsmål eller spørgsmål vedrørende valutakursordninger med en eller flere stater eller internationale organisationer, fastlægger Rådet, der træffer afgørelse med kvalificeret flertal på grundlag af en henstilling fra kommissionen og efter høring af ECB, uanset artikel 300 arrangementer for forhandling og indgåelse af sådanne aftaler. Disse arrangementer skal sikre, at Fællesskabet udtrykker én enkelt holdning. Kommissionen tilknyttes forhandlingerne fuldt ud.

Aftaler, der er indgået til dette stykke, er bindende for Fællesskabets institutioner, ECB og medlemsstaterne."

Nevndu sáttmálar um gjaldoyrasamstarv millum ES-lond og lond/øki uttan fyri ES eru fordømi, sum Danmark kann vísa til, í tann mun Danmark hevur fyri neyðini at tryggja undirtøku hjá ES-myndugleikum fyri gjaldoyrasamstarvi við Føroyar.

Viðmerkingar til meginreglu 5

Búskaparlig skiftisskipan

Galdandi skipan viðvíkjandi ríkisveitingum

Veitingar úr ríkiskassanum viðvíkjandi Føroyum og føroyingum kunnu greinast í fýra bólkar:

38. Heildarveiting
39. Rakstur av ríkisstovnum í Føroyum
40. Aðrar óbeinleiðis útreiðslur at taka við í semju um búskaparliga skiftistíð
41. Útreiðslur, ið ikki skulu takast við í samráðingar um búskaparliga skiftistíð

Útreiðslur undir pkt. 1, 2 og 4 eru útreiðslur, sum vanliga eru við í almannakunngjørdum yvirlitum. Útreiðslur undir pkt. 3 hava ikki verið tíl skjals, ella hava bert verið tað partvíst.

Viðv 1. Heildarveitingin er lógarbundin játtan á donsku fíggjarlógini. Heimild til játtanina á donsku fíggjarlógini er *Lov nr. 1010 af 23/12/1998*, har hetta er ásett:

„§ 1. Staten yder i 1999, 2000 og 2001 et årligt tilskud på 932,8 mio. kr. til Færøernes hjemmestyre.

§ 2. Tilskuddet reguleres i 2000 og 2001 med en procent, der svarer til den gennemsnitlige pris- og lønregulering på statens driftsbudget for det pågældende år."

Sí talvu 1

Viðv 3. Týdningarmiklar veitingar, sum á ymsan hátt koma Føroyum/føroyingum til góðar, og sum ikki eru vanligar at vera við í samráðingum um búskaparliga skiftistíð, eru:

- Lestrarstuðul og kapasitetsnýtsla á donskum lærustovnum: virðið á tænastu og veitingum kann leysliga metast til 100-150 mió. kr.
- Tænastur í sambandi við uttanríkisviðurskifti: virðið á hesum tænastum kann leysliga metast til 1,5 mió. kr.
- Aðrar tænastur: leyslig meting av virði kann ásetast til 100 mió. kr.

Sí talvu 2

a) Føroyar fáa part av tí parti av yvirskotinum hjá danska tjóðbankanum, sum verður goldin danska ríkiskassanum. Ætlan landsstýrisins er, at Føroyar framhaldandi skulu samstarva við Danmark um gjaldoyraskipanina. Grundgevast kann tí fyri, at landskassans partur av yvirskotinum hjá danska tjóðbankanum ikki eigur at vera tikin við í ta upphædd, sum búskaparliga skiftisskipanin skal fevna um, m.a. tí at yvirskotsparturin er at rokna sum avkast av seðlaumfarinum í Føroyum, sum er skuld hjá danska tjóðbankanum til Føroya.

b), c) og d) Hesar upphæddir verða hildnar uttanfyri samráðingar um búskaparliga skiftistíð, tí talan er um skyldur hjá ríkiskassanum mótvegis einstaklingum í Føroyum í sambandi við starvstíð teirra sum tænastumenn hjá danska ríkinum.

Núggj skipan viðvíkjandi ríkisveitingum

Samráðingar um búskaparliga skiftistíð taka støði í:

- Verandi útreiðslustøði viðvíkjandi heildarveiting, rakstri av ríkisstovnum í Føroyum og øðrum veitingum og tænastum, sum eru nevndar undir pkt. 1-3 omanfyri. Her er talan um útreiðslur, ið tilsamans eru umleið 1.300 mió. kr.
- Skuld landskassans.
- Fíggjarognum og føstum ognum hjá danska ríkinum viðvíkjandi Føroyum.

Endamálið er at tryggja eitt samráðingarúrslit, sum órógvar føroyska búskapin sum minst og sum tryggjar føroyskum myndugleikum umstøður til at fremja tillagingar av føroyska búskapinum á varðligan hátt.

Ítøkiligir partar av semjuni um búskaparliga skiftistíð fevna um:

- Kapitalisering, niðurskriving av skuld, avhending av donskum ríkisognum viðvíkjandi Føroyum og líknandi *eingangs-flytingar*.
- Minking av heildarveiting yvir eitt áramál, har minkingin verður tengd at 1) omanfyri nevndu *eingangs-flytingum* og 2) gongdini í bruttotjóðarútgáva Føroya ella øðrum viðkomandi makrobúskaparligum máti.

Viðmerkingar til meginreglu 6

Fyrisitingarligt samstarv

6 a) Uttanríkismál

Galdandi skipan viðvíkjandi uttanríkismálum

Á uttanríkisøkinum í Føroyum er í dag ein uttanríkisdeild við sjey fólkum í Løgmansskrivstovuni, umframt at eitt fólk er í Brússel, trý í Keypmannahavn og eitt í Aberdeen. Harafrat er eitt starvsfólk í donsku uttanríkistænastuni, sum tekur sær av føroyskum viðurskiftum burturav.

Í altjóða samanhangi eru Føroyar á flestu økjum partur at teimum altjóða skyldum, ið Danmark hevur átikið sær. Sambært heimastýrislógini er greitt ásett, at ríkismyndugleikarnir hava avgerðarrættin í spurningum, sum viðvíkja ríkisins viðurskiftum við útheimin. Hesi mál kunnu sostatt ikki yvirtakast. Øll uttanríkismál eru í dag felagsmál. Tað er tó soleiðis, at heimastýrið í ávísan mun virkar sjálvstøðugt á økinum. Grein 8 í heimastýrislógini heimilar í ávísum førum føroyingum at samráðast við onnur lond, har umboð fyri uttanríkistænastuna eru við sum eygleiðarar. Hetta hevur serstakliga verið nýtt í sambandi við fiskiveiðisamráðingar, men seinnu árini eisini meiri og meiri í sambandi við handilssamráðingar.

At avgerðarrætturin í uttanríkismálum í dag liggur hjá donsku ríkisstjórnini avmarkar rásarúmið hjá føroyingum í altjóða høpi í stóran mun. Verandi støða hevur eitt nú við sær, at Føroyar ikki kunna gerast partur í felagsskapum sum EFTA og luttaka í samstarvið innan EBS, um ynski eru til tess. Slíkt samstarv fevnir bert um fullveldisríki.

Tá ið uttanríkismál skulu røkjast standast eisini trupulleikar av, at áhugamálini hjá londunum báðum langt frá altíð eru tey somu, og ofta eru tey beinleiðis mótstríðandi.

Formliga er tað so skipað, at alt samskifti við myndugleikar í øðrum londum eigur at fara ígjøgnum danska uttanríkismálaráðið. Hetta hevur í nógvum førum havt við sær, at mál ikki verða avgreidd heilt so skjótt sum ein kundi ynskt frá føroyskari síðu. Um hetta stendst av, at áhugamálini ikki eru tey somu, ella at danska uttanríkismálaráðið ikki hevur orku at taka sær av føroyskum viðurskiftum skal støða ikki takast til her, men staðfestast má, at skipanin ikki virkar á nøktandi hátt, tá ið hugsað verður um føroysk áhugamál. Eldhugurin at virka fyri einum máli verður ongantíð tann sami, um virkast skal fyri áhugamálum annra landa.

Núggj skipan viðvíkjandi uttanríkismálum

Í mun til eitt nú støðu Íslands á uttanríkispolitiska økinum í 1918 kann út frá omanfyrinevnda staðfestast, at føroyingar ikki standa heilt á berum, tá ið talan er um uttanríkismál, hóast hetta er eitt felagsmál. Tað eru tó sum nevnt ávís viðurskifti, ið gera, at verandi støða á uttanríkispolitiska økinum fyri Føroyar ikki er nøktandi. Hetta fevnir sum sagt um trupulleikar bæði av formligum slagi og tá ið talan er dagliga arbeiðið og samskiftið úteftir.

Við omanfyristandandi í huga eiga í sáttmála við donsku ríkisstjórnina ásetingar um fyrisitingarligt samstarv at verða gjørdar, ið staðfesta, at Føroyar, antin í eini skiftistíð ella í eini varandi skipan, kunna keypa tænastur frá donsku uttanríkistænastuni, har ið Føroysk orka ikki røkkur til. Í hesum sambandi verður serliga hugsað um møguleikan frá føroyskari síðu, at nýta danskar sendistovur í samskiftinum við útheimin.

At útbúgva fólk hevur sera stóran týdning í sambandi við at skipa eina fullvirkna føroyska uttanríkistænastu. Sum lið í samstarvinum við donsku ríkisstjórnina í uttanríkismálum eigur tí at verða lagt upp fyri, at føroyingar fáa møguleika at eftirútbúgvast í donsku uttanríkistænastuni.

6 b) Dómstólar, ákæruvald, løgverja, varðhald og kriminalforsorg

Galdandi skipan viðvíkjandi dómsvaldi, ákæruvaldi, løgverju, varðhaldi og kriminalforsorg

Í fyrisitingarpartinum í hvítubók (s. 81-99) er gjørd lýsing av hvussu økini eru skipað í dag og kostnaðurin av teimum.

Tað sum eyðkennir málsøkini er, at tey, burtursað frá løgverjuni, ikki eru nevnd í heimastýrislógini, og at tey tí eru felagsmál, sambært heimastýrislógini § 6 1. stk. sum burtursað frá løgregluni, ikki fult út ber til at yvirtaka sambært galdandi skipan.

Eitt annað sum er felags fyri hesi øki er, at teirra virksemi stórt sæð er skipað í rættargangslógini og borgarligu revsulógini.

Danska ríkisstjórnin fíggjar málsøkini í dag. Sambært Hvítubók eru 169 fulltíðarstørv í skipanini í dag, og kosta málsøkini umleið 70 mió. kr. árliga í beinleiðis kostnað. Harumframt er ein óbeinleiðis kostnaður, sum ikki ber til at gera upp, uppá umleið 10 mió. kr. árliga. Samlaði kostnaðurin, 80 mió. kr. er ikki íroknaður heildarveitingini.

Núggj skipan viðvíkjandi dómsvaldi, ákæruvaldi, løgverju, varðhaldi og kriminalforsorg

Sambært núggju skipanini er ætlanin at nevndu málsøki skulu koma undir føroyskt lógagávu- og fyrisitingarvald.

Neyðugt verður tí at taka støðu til hvussu hesi málsøki skulu skipast.

Tá ið tað snýr seg um løgverjuna verður mælt til, at samstarvssamjur verða gjørdar viðvíkjandi útbúgving og kriminalteknisknum kanningum.

Roknað verður harumframt við, at neyðugt verður at gera samstarvssemjur viðvíkjandi dómsvaldinum, serliga tí nógv og ymisk krøv verða sett til dómsvaldið, bæði á fakøkinum og á skipanarøkinum.

Annars ger Hvítabók ikki nógv burtur úr hesum, men vísir til rættarskipanarnevndina undir grundlógarnevndini, ið hevur til uppgávu at gera uppskot til eina føroyska rættarskipan.

Tað er sannlíkt at rættarskipanarnevndin ikki kann náa at gera fullfíggjað uppskot til føroyska rættarskipan, ið verður klárt til samráðingarnar við ríkisstjórnina.

Spurningurin er tí hvørjir møguleikar eru fyri skipanarligum loysnum fyri hesi málsøki, í sambandi við at sáttmálin kemur í gildi, og hvørji loysn landsstýrið undir samráðingunum eigur at virka fyri.

1. Ein møguleiki er, at í eini skiftistíð til føroyskir myndugleikar hava gjørt av hvussu málsøkini skulu skipast, verða málsøkini, ella partar av teimum, løgd til danskar ríkismyndugleikar at umsita.

2. Ein annar møguleiki er at yvirtaka starvsfólkini í verandi skipan og sostatt hava eina skipan undir føroyskum lógagávu- og fyrisitingarvaldi samstundis sum sáttmálin fær gildi.

Ad 1) Aygerandi fyri um hendan loysn er gjørlig er fyri tað fyrsta tengd at spurninginum hvørt føroyingar vilja hava donsku ríkismyndugleikarnar at umsita málsøkini aftaná at tey sambært sáttmálanum eru komin undir føroyskt löggávu- og fyrisitingarvald.

Ad 2). Avgerandi fyri um hendan loysn er gjørlig er fyri tað fyrsta tengd at spurninginum um flestu starvsfólkini verða verandi í skipanini aftaná at sáttmálin er komin í gildi.

Við loysn 1 fer landsstýrið at endurrinda donsku ríkismyndugleikunum kostnaðin av at umsita skipanina.

Við loysn 2 fer landsstýrið beinleiðis at rinda kostnaðin av skipanini.

Mett verður tí, at tað er skilabest at landsstýrið arbeiðir fyri loysn 2.

Mett verður ikki at tað er nakar trupulleiki at gera eina skipanarliga loysn fyri økið, ið kemur í gildi samstundis sum sáttmálin. Tað sama ger seg galdandi viðvíkjandi samstarvssemjum á økinum.

Talva 1

Viðv. 2. Nettoútreiðslur hjá ríkiskassanum til rakstur av ríkisstovnum í Føroyum eru:

	1995	*1996*	*1997*	*1998*	*1999*
Ríkisumboðið	5,5	5,2	6,0	6,0	6,0
Landslæknin	1,0	1,0	1,0	1,0	1,1
Statens luftfartsvæsen	7,2	4,5	5,6	4,3	4,5
Sorinskrivarin	2,5	3,0	3,0	2,5	2,8
Løgverja og varðhald	43,6	56,9	49,5	46,7	49,3
Søfartsstyrelsen	2,2	2,2	2,2	2,1	2,2
Farvandsvæsenet	7,7	5,3	6,0	7,0	5,8
DMI	4,2	3,6	3,7	4,6	3,5
GEUS	0,3	0,3	0,3	0,9	0,9
Kirkja	7,1	7,1	7,7	12,6	12,8
Statens Kunstfond	..	..	0,1	0,1	0,1
Alt uttan verja	81,3	89,1	85,1	87,8	89,0
Verja	173,6	177,0	186,6	192,8	196,7
Í alt	254,9	266,1	271,7	280,6	285,7

Talva 1

Viðv. 4. Útreiðslur av týdningi undir hesum punkti eru:

	1999
sa) Partur av yvirskoti danska tjóðbankans[1]	21,0
ta) Kríggspensiónir	83,3
ua) Lærarapensiónir[2]	14,9
va) Aðrar pensiónir	11,1